# Dýrari at kanna trygdarútgerð

**Síðan Skipaeftirlitið varð yvirtikið, er eftirlitið av trygdarútgerð umborð á skipum vorðið dýrari. Orsøkin er, at klassin ger arbeiðið fyri skipaeftirlitið**

TRYGDARKANNING
*Edvard Joensen*



*Tað kostar einum skipaeigara upp til einar 10.000,- krónur at fáa trygdarútgerðina umborð á skipi kannaða. Hetta gjaldið er komið, síðan Skipaeftirlitið varð yvirtikið*

Tað kostar einar 10.000,- krónur at fáa trygdarútgerðina umborð á einum línuskipið kannaða. Hetta er meirkostnaður, sum er komin, síðan Skipaeftirlitið vað yvirtikið, sigur ein reiðari, sum Sosialurin hevur tosað við.

Tað er rætt, váttar stjórin á Skipaefirlitinum. Og tað verður gjørt soleiðis sambært løgtingslóg um trygd á sjónum, sum er frá 2001.

Tá trygdarútgerðin umborð á føroyskum fiskiskipum í dag verður kannað, er tað klassin, sum ger hetta arbeiðið. Og fyri hendan ómakin fær reiðaríið so eina rokning, sum kann liggja frá 5.000,- til einar 10.000,- krónur, sigur reiðarin, sum Sosialurin hevur tosað við.

Hann vísir á, at hendan eykaútreiðslan er rímiliga nýggj, og var ikki, tá skipaeftirlitið var danskt. Tá var tað Statens Skibstilsyn, sum gjørdi hetta eftirlitið, og tað varð ikki tikið eykagjald fyri tað.

Óli Hans Hammer Olsen, stjóri á skipaeftirlitinum, váttar, at Skipaeftirlitið ikki ger tey eftirlitini, sum talan er um. Tað verður latið klassanum at gera. Sambært løgtingslóg um trygd á sjónum, sum er frá 2001, er Skipaeftirlitinum heimilað at leggja eftirlitið við trygdarútgerð til persónar ella fyritøkur, sum Skipaeftirlitið metir hava førleika til tess.

Grundgevingin fyri hesi heimild er, sigur Óli Hans Hammer Olsen, at avlasta almennu fyrisitingina sum mest.

Í Føroyum verður hetta latið klassanum at gera. Tað eru tey trý feløgini, sum umboðað eru í Føroyum. Tey eru Lloyds, Norske Veritas og Bur. Veritas. Og tey gera tað so móti brúkaragjaldi, sigur hann. Brúkaragjald er alt meira vanligt eisni í londunum rundan um okkum. Tað er í grundini bara føroyska Skipaeftirlitið, sum ikki krevur brúkaragjald, sigur stjórin.

Sum grundgeving fyri, at Skipaeftirlitið ikki sjálvt ger hesi eftirlit við trygdarútgerðini, nevnir Óli Hans Hammer Olsen manningartrot.

Skipaeftirlitið er stutt og greitt ikki nóg væl mannað til allar tær uppgávur, sum áliggja teimum. Tí er henda kunngerðin, sum heimilar at lata onnur gera vísar uppgávur, eisni sera hent, sigur hann. Tá skipaeftirlitið var danskt, sýnaðu teir skip. Og tað var so tað. Og tað enntá við fleiri donskum sýnsmonnum, sum ikki koma hendanveg, nú eftirlitið er yvirtikið. Í dag verður rættiliga nógv gjørt av at sýna smáar batar eisini, sigur Óla Hans Hammer Olsen.

Tað er ikki smávegis lógarverk, Skipaeftirlitið skal umsita, sigur stjórin. Ikki færri enn 4.000 síðum skulu tey hava skil á. Og talan er um altjóða reglur, sum skulu haldast. So greitt er, at við tí manningartali, sum er á stovninum, er veruliga neyðugt at leggja onkrar uppgávur til avgreiðslu uttan fyri húsið. Eitt nú eftirlitið við trygdarútgerðini.

# Skeiv tøl á fíggjarlógini

**Tað er alt ov lítið tikið til, tá fíggjarnevndin metir, at ein millión skal hækkað mjólkarstuðulin til tað dupulta av tí, hann er í dag, sigur bóndi**

MJÓLKARSTUÐUL
*Edvard Joensen*


*Skal mjólkarstuðulin náa einari krónu fyri liturin, má játtanin á fíggjarlógini hækkast munandi, ella skulu hesar og fleiri av teirra medsystrum gevast at mjólka*

Fíggjarnevndin siktar ov lágt, tá hon metir, at hon kann hækkað mjólkarstudningin við 50 oyrum fyri liturin við at seta eina millión afturat á fíggjarlógini til tað endamálið.

Tað sigur Tróndur Niclasen, bóndi í Bø, sum vísir á, at skal hatta talið við einari krónu fyri liturin halda, skal hækkanin vera tríggjar milliónir heldur enn tann eina, sum fíggjarnevndin hevur ásett.

Hann heldur ikki, at nevndarlimirnir rættiliga hava sett seg inn í málið, tá teir siga soleiðis í álitinum til Løgtingið:

»Nevndin hevur ynskt at hækka játttanina við kr. 1 mió. til at hækka mjólkastuðulin eftir viðmerking frá vinnunevndini, soleiðis at mjólkastudningurin verður 1 kr. pr. litur.«

Tróndur Niclasen vísir á, at framleiðslan ídag er sjey milliónir litrar árliga, og stuðulin er 50 oyri fyri hvønn litur. Ein millión gevur so 14 oyru fyri liturin, og aftur at teimum verandi 50 oyrunum, røkka tey ikki til eina krónu.

»Skulu vit náa hesi krónuni, má játtanin upp á umleið 3,55 milliónir krónur«, sigur Tróndur Niclasen, bóndi.

Men á Mjólkarvirkinum hjá MBM eru tey ikki heilt samd við bóndan.

Tað er rætt, verður sagt frá MBM, at stuðulin til framleiðaran skal hækkast nógv meira enn eina millión fyri at náa einari krónu fyri liturin. Men tá flutningstuðulin verður tikin við, verður samlaði mjólkarstuðulin ivaleyst at liggja um tað einu krónuna við hesi hækkingini, siga tey hjá MBM.